útbyggingin av Eiðisverkinum, sum Páll eisini heldur hava verið ein góð íløga, hóast kostnaðurin kann tykjast at vera høgur. Men hann er uppá seg tó ikki stórt hægri enn upprunaliga íløgan.

Páll dylir ikki fyri, at hann avgjørt stuðlar vatnorkuútbygging, tá hon er gjørd við skili. Hon kostar nakað nógv í íløgu, men raksturin er bíligur. Tá ið íløgan er goldin, tá er vatnverk eitt gullnám. Framleiðslan er eisini sera umhvørvisvinarlig, sum ikki minst hevur týdning í hesum tíðum.

Hann heldur, at vatnorkan kann tvífaldast eftir einum 30 árum, og harvið kann parturin av vatnorkuframleiðslu økjast munandi. Um onkur skuldi hildið, at hetta er nakað nógv avgjørt, so eru framvegis stórir møguleikar.

Páll metir eisini, at møguligt er at útbyggja vindorkuna, men her krevst eitt sterkt maskinarí. Men menningin hevur verið stór á hesum øki seinastu árini, og hetta kann bert gagna hesi gongdini.

Við streymorku skuldi Vestmannasund verið ein góður møguleiki. Men hinvegin ivast Páll í kaðalinum úr Íslandi, sum hevur verið nógv uppá tal. Tað er sínar sakir at hefta seg at einum øðrum landi. Har kann mangt henda, sum vit sjálvi onga ávirkan hava á.

Her kann eisini vera nevnt, at Páll var nevndarlimur hjá Ídnaðargrunninum, so leingi hann var til, og størsta partin av tíðini var hann formaður. Hesin grunnur hevði stóran týdning fyri føroyskan ídna ta tíð tað var.

### Fróðarmaður

Páll hevur verið ein sera virkin pensjonistur, og ikki minst hevur hetta verið í hansara upprunabygdum Lorvík og Gøtu. Hann hevur verið nógv í Jákupsstovu í Norðragøtu, barndómsheiminum hjá mammuni, sum stendur á sjálvari Tróndargrund. Her hevur verið snøggað og hugnað um, og eigur Páll sín part av heiðrinum fyri, at gamla bygdin í Norðragøtu er so hugnalig, sum hon er.

Eisini er hann virkin í eldrafelagnum Fjallið við limum báðum megin Lorvíksfjall, sum bæði skilir og bindir bygdirnar saman.

Páll er fróðarmaður. Vit eru skyldmenn, og bert hetta gevur okkum nógv at tosa um.Hann er ættarkærur sum fáur. Eisini hevur hann mangan verið hentur, tá ið skrivast skal um felags áhugaøki, og onkur spurningur hevur verið, sum greiða skuldi fáast á.

Páll giftist í 1955 við Betty, sum er av Strondum. Hon er dóttir Kristinu og Thorvald Joensen, sum var ættaður úr Lorvík. Tey vóru trý systkin. Hanna doyði ung, meðan Jógvan hevur siglt nógv úti í heimi.

Tey fyrstu árini, Páll arbeiddi fyri SEV, búðu tey í Vestmanna. Men tá ið SEV flutti høvuðssætið til Havnarí 1967, fluttu tey við, og búgva tey í dag í Dr. Dahlsgøtu.

Tey eiga tvey børn, Høgna og Eydnu. Høgni býr í Litava, og Eydna býr við manninum Anfinn inni hjá teimum báðum. Eydna og Høgni eiga tvey børn í part.

Føðingardagurin verður hildin saman við familjuni. Vit vilja ynskja Páll og hansara hjartaliga tillukku við hesum stóra degi.

**ó.**

## Andlát og jarðarferðir

**Paula Jespersen** í Trongisvági andaðist á Landssjúkrshúsinum 30. desember, 89 ára gomul.

**Leiv Isholm** fer til gravar úr Prestebo kirke í Herlev fríggjadagin 2. januar klokkan 14.

**Haldgrím Gregersen** Syðrugøta andaðist 29. desember, 76 ára gamal.

Okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Paula Jespersen**
Trongisvági

andaðist á Landssjúkrahúsinum 30. desember, 89 ára gomul.

Kistan fer úr heiminum fríggjadagin 2. jan. kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Salem leygardagin 3. januar, kl. 13.30.

**90 ára føðingardagur**
Mánadagin 5. januar fyllir Bina Rasmussen, Klaksvík, 90 ár. Dagurin verður hildin á sjómansskúlanum í Klaksvík leygardagin 3. januar kl 17.

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 3. januar verður Páll Mikkelsen, verkfrøðingur, Tórshavn 80 ár. Føðingardagurin verður hildin saman við teimum nærmastu.

**70 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 9. januar verður Finnbogi við Gjónna, Fuglafjørður, 70 ár. Dagurin verður hildin Leygardagin 10.januar í Lonini í Fuglafirði kl. 18.00 har øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
5. januar verður Jórun Jensen í Klaksvík 60 ár. Dagur verður hildin heima við Grástein 8, frá kl. 15, leygardagin 10. januar.

**Brúdleyp**
Leygardagin 3. januar giftast Vivi E. Joensen, Lamba, og Virgar Poulsen, Fuglafirði. Vígslan verður í Elim í Søldarfirði kl. 12.00.



# 25 ár hjá Tórshavnar Havn

Jóhan Christiansen í Havn hevur starvast í 25 ár sum havnarumsjónarmaður í Havn. Tað var í januar 1984, at hann bleiv settur í starv hjá Tórshavnar Havn.

Jóhan er 65 ára gamal og útbúgvin navigatørur. Sum 15 ára gamal fór hann í 1958 til skips við ”Bresti”. Í 1961 skifti hann hýru og fór við ”Hoyvíkingi”.

Í 1964 fór Johan á stýrimansskúla, og eftir lokið prógv í 1966 fór hann aftur við ”Hoyvíkingi”, til hann í 1969 fór at ganga til skipsførara. Eftir at hava fingið skipsføraraprógv í 1970 sigldi hann sum stýrimaður við á ”Fuglfirðingi”og var hann skipari á bátinum frá 1975 til 1983. Síðan januar 1984 hevur hann verið í starvi hjá Tórshavnar Havn.

Foreldrini hjá Jóhan vóru Hanna, sum var ættað úr Klaksvík, og Eli Christiansen úr Havn.

Jóhan er giftur Hjørdis, f. Simonsen, úr Fuglafirði. Tey eiga børnini: Eli, Elsu Mariu og Jóhan Martin.

# Kartni Winther 95 ár

Fríggjadagin 2. januar fyllir Kartni Winther, fyrrverandi heilsølumaður í Havn, 95 ár.

Kartni er føddur í Havn 2. januar 1914, sonur Sigrid, f. Mohr, vanliga nevnd Gigga, úr Havn, og Mads Andreas Winther av Sandi. Í 1916 flutti Kartni saman við foreldrunum til Sands, tá papin bleiv settur sum sýslumaður har. Sum sjey ára gamal kom hann aftur til Havnar at ganga í skúla. Hann gekk í barnaskúla, millumskúla og realskúla. Síðan fór hann í skrivstovulæru hjá Balslev & Co.

Í 1935 fór hann til Keypmannahavnar at ganga á handilsháskúla. Tá hann varð liðugur við skúlagongdina, var seinni heimsbardagi byrjaður, og hann slapp tí ikki heim. Hann arbeiddi sum skrivstovumaður og var virkin í Føroyingafelagnum í Keypmannahavn undir krígnum.

Hann giftist í Keypmannahavn við Dagmar, f. Johannesen, ættað úr Funningi, sama dag sum tey fóru til Føroya við fyrsta farti eftir kríggið í 1945.

Kartni fór aftur í starv sum skrivstovumaður hjá Balslev & Co og bleiv stjóri har í 1956. Hetta starv røkti hann, til hann í 1969 yvirtók heilsøludeildina hjá Balslev, sum seldi matvørur og skipsútgerð. Tá stovnaði hann sína egnu fyritøku, Kartni Winther & Co., sum helt til á Eystaru Bryggju. Seinni bleiv ein nýggjur heilsølubygningur bygdur við Staravegin. Tá Kartni gavst, yvirtók Torbjørn Sørensen, sum arbeiddi hjá honum, fyritøkuna.

Kartni Winther var býráðslimur í Havn í 50-unum og hevur sitið í ymiskum nevndum, eitt nú líkningarnevndini og skúlanevndini.



*Kartni Winther á 90 ára føðingardegnum, sum varð hildin í Hornahúsinum*